
West Hercules sett sín serstaka dám á alt Skálafjarðarøkið í langa tíð. Mynd Jan Müller

# West Hercules fer í morgin

Deil:

**Jan Müller**

29.09.2014 - 22:31

Oljan.fo

Tíðliga týsmorgun stevnir ein av heimsins størstu boripallum, West Hercules út av Skálafjørðinum við kós móti New Foundlandi. Pallurin kom inn á fjørðin 19. august og eru umvælingar gjørdar umborð í skjótt hálvan annan mánað.

So mikið stóran týdning hevur pallurin havt fyri føroyska vinnu, at hann fríggjadagin varð kosin Ársins átak á árliga Vinnudegnum.

Fyrr í dag legði hotellskipið “Nordstjernen” frá landi í Runavík við kós móti Norra. Skipið hevur givið innivist til stórt tal av arbeiðsfólki hesa tíðina pallurin hevur verið umvældur.

Nógvar føroyskar fyritøkur hava verið partur av arbeiðinum, sum Pam Offshore Service og Mest hava staðið fyri saman við norska felagnum “North Atlantic Drilling”. Arbeiðið hevur givið nógv arbeiði og inntøkur til alt økið kring fjørðin umframt onnur pláss í landinum eisini.

Tað er greitt, at tað fer at vera saknur í pallinum, sum umframt at geva arbeiði til nógvar hendur, eisini hevur upplýst part av fjørðinum hvørja nátt.

Hetta er so fyrstu ferð nakrantíð, at ein boripallurin hevur verið á Skálafjørðinum, og einki er at ivast í, at oljuvinnan á staðnum og kring landið alt fer at halda seg framat til at umvæla aðrar pallar í framtíðini eisini. Henda fyrsta sveinaroyndin hevur gingið avbera væl skilst.